# Sjómansprestastarvið – ein kristin kriminalsak

**2. partur**

ESSAY

*Føroyska sjómanskirkjan*
*Ólavur Rasmusen*



Havi altíð trivist væl saman við menniskjum, sum fáa góð hugskot. Haldi tey eru so lærurík og spennandi. Tá ið eg var sjómansprestur í London hevði eg ein starvsfelaga, sum kallaðist Poul Erik Fabricius; ein dugnaligur prestur, ein eldsál. Ein góður menniskjakennari, ja rætt og slætt ein funnin fressur at starvast millum sjófólk.

Tað var eitt eyðkennið fyri sjómanskirkjuna í London, at har var altíð nógv fólk til guðstænastu. Nógvir London danir plagdu at flenna at sær sjálvum, at meðan teir búðu í Danmark droymdu teir ikki um at seta sín fót innan kirkjugátt, mens so skjótt sum teir komu til Englands fingu teir hug at ganga í kirkju. Tað búgva eini 20.000 danir í London, umframt alt tað siglandi fólkið, so har var ríkiligt at gera hjá tveimum prestum.

Stutt eftir at eg var byrjaður upprann tann dagur, at konfirmantarnir skuldu skrivast inn. Har møtti hópurin av konfirmantum, og foreldrini sjálvandi. Ein stórur, bulmikil maður, ikki hvør sum helst, hann var militerattaché á donsku sendistovuni, tók í hondina á okkum, og segði so hart, at tað rungaði eftir í: "Sonur mín skal konfirmerast, og tað er í lagi, men sjálvur trúgvi eg ikki á nakað sum helst." Onkur gjørdist eitt sindur illa við, men Poul Erik lætst ikki um vón. Tá ið øll vóru setst beyð hann vælkomin, og greiddi frá, hvussu undirvísingin var skipað. So festi hann eyguni á militermannin, og segði: "Eg skilji á lagnum, at nøkur av teimum vaksnu inni her ikki skilja ein skvøtt av kristindóminum. Var tað ikki eitt hugskot, at øll foreldrini eisini møta til konfirmantundirvísing?" Militermaðurin gløddi uppá hann, sum um ein fremmandur herur hevði tikið hann á bóli, men áðrenn hann fekk umrátt seg, beyð Poul Erik øllum inní prestagarðin, sum var áfastur kirkjuna, at fáa sær ein drekkamunn. Har sótu vit og hugnaðu okkum og prátið gekk so lystiliga.

Vikuna eftir møttu, uttan undantak, øll foreldrini til undirvísing saman við konfirmantunum. Hetta var ein festlig forsamling, og ein nýggj tradition var fødd í London. Tá ið eg nakrar vikur seinni prædikaði í kirkjuni sat miliermaðurin mitt í rokanum, og sá so æviga væl nøgdur út. Sum siður er, heilsaði eg aftaná guðstænastu uppá alt kirkjufólkið. Tá ið militermaðurin trein út í túnið, tók hann fast í hondina á mær, og so kom tað buldrandi úr honum: "Hr. Rasmussen, ham dér Jesus, han er sgu ikke så tosset!"

So nógv gott kann spyrjast burturúr einum góðum hugskoti. Poul Erik var ein fongur fyri sjómanskirkjuna.

Men tað er sanniliga munur á at fostra hugskot í London og í Føroyum. Ikki tí, uppskotið, sum eg sendi landsstýrinum fekk eina stak góða móttøku av tí politiska myndugleikanum. So mikið góða, at mentamálaráðharrin setti eina nevnd at gera eitt álit. Ì nevdini sótu Kristianna S. Jacobsen, fulltrúði, Jógvan Fríðriksson, formaður í nevndini fyri føroysku sjómanskirkjuna og undirritaði, eftir tilmæli frá Jógvani og Hans Jacob.

Samstundis sum hetta hendi hittust allir prestarnir í bispagarðinum til døgurða. Tað var ólavssøka, og tað er gomul siðvenja, at vit møtast hjá bispi aftaná guðstænastuna. Ì gomlum døgum, tá íð Jóhan Nielsen, Aksel Tórgarð og aðrir vóru virknir sum prestar var bispadøgurðin eitt satt symposium á høgum plani. Stuttligar røður vórðu hildnar og tað var ikki fatað sum nøkur synd at flenna í kíki. Tað gav at bíta, tá ið Eyvind Wilhelm og Jóhan Weiði, sum báðir vóru stórir humoristar, vóru so rørandi samdir um, at konufólki skuldi ein halda seg langt burtur frá, tí tað var bara til besver. Hetta var sjálvandi alt tað reina skemt, men tað gjørdist ikki minni stuttligt, tá ið Jóhan Nielsen, við sínum velduga kroppi undir liðini á síni prúðu konu á rammligum sandvíksmáli tók so dýran til: "at tað kann je fortelja tykum báðum, Eyvindi og Jóhan, at einastu trupulleikar, sum Birte og je hava í húnalagnum, tað eru seingjarbotnarnir." Jú, tað vóru dagar.

Ná, aftur til nútíðina. Tað er eisini siðvenja, at aftaná borðhaldið skal tann presturin, sum árið eftir eigur at halda ólavsøkuprædikuna, at flyta fram høvuðsrøðuna. Einasta treytin er, at røðan skal vera óteologisk og eftir førimuni vitborin skemtingarsom. Talan fall einum í lut, sum eg ikki skal nevna við navni, men talan snúði seg úr enda í annan um bøssar, lesbisk og onnur útskot. Einasti uggin var, at talarin uppnáddi tað øvuta av tí tilætlaða; komikkurin varð settur í hásæti, hóast tað so tragiskt gekk útyvir nøkur sóknarbørn, sum eru skapað av Guði, eins og øll onnur menniskju.

So kom løtan at viðgera sjómanskirkjuna og at velja nevndina. Men stílurin var longu lagdur. Luftin var tjúkk av vanvirðing. Umframt brævið til landsstýrið hevði eg skotið upp, at nevndin skuldi broytast, so hon taldi fimm limir, heldur enn fýra. Eg segði sum var, at ongastaðni í heiminum situr ein nevnd við einum líkatali, sum hevur so stóran myndugleika, at hon skal gera innstilling millum starvssøkjarar. Ein ávaring, sum seinni skuldi vísa seg at gerast profetisk.

Nevndin í sjómanskirkjuni er soleiðis skipað, at har sita tríggir prestar, og eitt umboð fyri útisiglandi. Eg skeyt upp, at Føroya Fiskimannafelag fekk ein nevndarlim, tí at fiskimannafelagið hevur limaskap í ITF, sum er ein altjóða fiskimannafelagsskapur, ið stuðlar sjómanskirkjum um allan knøttin. Tað snúði seg um at leggja ein góðan botn undir ein nýggja byrjan.

Ein av kirkjunar valdmiklastu monnum reisti seg upp, og legði meg undir at hava framt eitt sniðálop á føroysku sjómanskirkjuna við at senda eitt uppskot til Føroya landsstýri, vegna sjómanskirkjuna, við mínum navni undir. Hann sáplaði, snøgt sagt, hvørt einasta uppskot niður, sum eg var komin við, við teirri próvførslu, at undirritaði var so og so. Men tað løgna var, at hann ikki mælti eitt orð um at taka uppskotið aftur, sum eg hevði sent landsstýrinum. Í hansara fávitskuta persónsbriglsi avdúkaði hann tað fullkomna dupultspælið; fuglurin skuldi skjótast, men eggið skuldi fyri ein og hvønn prís bjargast frá undirgangi, tí at tað var eitt alt, alt ov dýrabært egg. Ein hugburður, sum eisini hevur eyðkent ein part av nevndini.

Eg valdi at tiga, øll tagdu, bæði høgravongurin, vinstravongurin og miðleingjan. Eingin segði sum var, at eg hevði fingið tilsøgn um at skriva hatta brævið. Í staðin hoyrdist teskan um, at eg bara virkaði fyri einum starvi, sum eg sjálvur ætlaði mær. Eg smíltist innantanna og visti, at terningarnir vóru kastaðir.

Tí undraði tað meg als ikki, at eg ikki varð valdur í nevndina. Nú var eg í teirri løgnu støðu, at eg sat sum limur í eini nevnd undir landstýrinum, sum skuldi gera álit um føroyska sjómansprestastarvið, samstundis sum eg var óynsktur av mínum starvsfeløgum. Men eg helt hugskotið vera so gott, at eg valdi at arbeiða víðari við málinum.

Men tað, sum ikki hevði verið, tað bleiv.

(framhald)



*Í gomlum døgum var bispadøgurðin eitt satt symposium á høgum støði*

*Mynd: Jens Kristian Vang*